## Umsókn um barsilspening
Arbeiðsgevari

Barsilsskipanin

Henda umsókn er til arbeiðsgevarar, ið rinda A-inntøku til starvsfólk í barsilsfarloyvi.
Vegleiðing til hvønn einstakan teig er aftast í umsóknini saman við treytunum fyri at fáa barsilspening.
Freistin at søkja er 1 ár eftir barnsburð/ættleiðing.
Vinarliga skriva við spjaldrastavum.

### 1. Arbeiðsgevari

| | |
|---|---|
| Navn: | V-tal: |
| Gøta og gøtunummar: | Postboks: |
| Postnummar og bygd/býur: | Telefon: |
| Ábyrgdarpersónur: | |
| Teldupostadressa hjá ábyrgdarpersóni: | |
| Kontunummar (kontustrongur, um talan er um landsstovn): | |

### 2. Løntakari, ið fer í barsilsfarloyvi

| | |
|---|---|
| Navn: | P-tal: |
| Gøta og gøtunummar: | Postboks: |
| Postnummar og bygd/býur: | Telefon: |
| Teldupostadressa: | |
| Nær byrjaði løntakarin at arbeiða fyri teg? (dg. mð. ár): | |

## Umsókn um barsilspening
Arbeiðsgevari

Barsilsskipanin

### 3. Barsilstíðin

| Frá (dg. mð. ár) | Til og við (dg. mð. ár) |
|---|---|
| | |
| | |
| | |

☐ 48 vikur eftir føðing
☐ 52 vikur eftir føðing (einlig/móttøku)
☐ 52 vikur eftir móttøku (pápin ella sammóðirin lata 4 vikur)

☐ + 4 vikur: Fleirburar
☐ + 8 vikur: Barnsburður áðrenn 32. viku

### 4. Arbeiðsmarknaðarviðurskifti

Full A-inntøka um mánaðin:
*(uttan eftirløn, frítíðarløn ella frítíðaríkoyti)*
Kr. ______________________

Er løntakarin partvíst í arbeiði hjá tær í barsilstíðini? ☐ Ja ☐ Nei

**Um ja**:
Hvussu nógv arbeiðir viðkomandi? (% av fullari tíð): ______________________

Tíðarskeið Frá: ____________________ Til og við: ______________________

### 5. Viðmerkingar

| |
|---|
| |
| |
| |
| |

## Umsókn um barsilspening
Arbeiðsgevari

Barsilsskipanin

### 6. Váttan frá umsøkjara

Eg vátti, at givnu upplýsingar eru sannar, og eg bindi meg til at geva Barsilsskipanini boð um allar broytingar, ið kunnu hava týdning fyri barsilsfarloyvið.

------------------------------ Dagfesting

------------------------------ Undirskrift og stempul
*(Er einki stempul, skriva fornavn og eftirnavn hjá undir-ritandi við blokkbókstavum oman fyri undirskriftina)*

### 7. Til løntakaran at fylla út

Hevur tú tilknýti til fleiri arbeiðsgevarar í barsilstíðini? ☐ Ja ☐ Nei

**Um ja:**
Hvørjar? ______________________________

Ert tú einlig/ur? ☐ Ja ☐ Nei

Hevur tú rætt til barsilspening úr øðrum landi? ☐ Ja ☐ Nei

Eg vátti, at eg eri um barnið í barsilstíðini. Eg vátti eisini, at upplýsingarnar í teigunum 2, 3 og 4 eru sannar.

------------------------------ Dagfesting

------------------------------ Undirskrift

### 8. Váttan frá mammu
*(Verður bert útfylt, um arbeiðsgevarin søkir vegna pápa ella sammóðir at barninum)*

Eg vátti, at umsøkjarin er pápi ella sammóðir at barninum.

______________ P-tal

______________ Navn

------------------------------ Dagfesting

------------------------------ Undirskrift

Um pápin ella sammóðirin søkja um barsilspening í meira enn 4 vikur eftir 14. viku eftir barnsburð, vátti eg, at eg ikki eri heima við løn í hesum tíðarskeiði.

------------------------------ Dagfesting

------------------------------ Undirskrift

## Høvuðstreytirnar fyri at fáa barsilspening

Rindar arbeiðsgevari A-inntøku í sambandi við barsilsfarloyvi, kann hann fáa barsilspening. Barsilsskipanin fær neyðuga vitan um lønarviðurskiftini frá TAKS. Útlendsk inntøka skal tó skjalprógvast við lønarseðlum.

Barsilspeningurin kann ongantíð vera meira enn 25.000 kr. av lønini hvønn mánað. Barsilspeningurin verður heldur ongantíð meira enn mánaðarliga lønin hjá løntakaranum. Bundið eftirlønargjald verður lagt afturat.

Rinda fleiri arbeiðsgevarar løn til sama persón í barsilsfarloyvi, og røkkur peningurin ikki til fult endurgjald, verður mánaðarliga endurgjaldið til hvønn arbeiðsgevara ásett lutfalsliga.

### Skjøl at lata inn saman við umsóknini

- Verður søkt um barsilspening í upp til 4 vikur áðrenn mettan barnsburð, skulu skjalprógv fyri mettan barnsburð, ið ljósmóðir, lækni ella kommunulækni hava váttað, ella bræv um skurðviðgerð (keisaraskurð) latast inn.
- Verður søkt um barsilspening í upp til 8 vikur áðrenn mettan barnsburð, skal læknaváttanin "váttan um sjúku hjá barnakonu ella vanda fyri fosturskaða" latast inn.
- Verður søkt um barsilspening fyri tíðarskeiðið eftir barnsburð, skal "Fráboðan um barnsburð" latast inn.
- Verður søkt um barsilspening í sambandi við ættleiðing, skal ættleiðingarváttan latast inn, og um søkt verður fyri tíðina 4 vikur áðrenn móttøku, so eisini skjalprógv um, nær farið varð eftir barninum.
- Tá søkt verður um barsilspening, skulu Landsstovnar lata inn skjalið "Ískoyti til landsstovnar".

### Lógargrundarlag

Løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan við seinni broytingum.
Kunngerð nr. 91 frá 31. mai 2001 um umsiting av Barsilsskipan.

## Vegleiðing til hvønn einstakan teig

**1. Arbeiðsgevari**
Skriva navn á arbeiðsgevara (virki), v-tal, bústað og møguligan ábyrgdarpersón.

Um kontunummur hjá landsstovnum er at siga, at av tí at øll løn hjá landsstovnum verður rindað gjøgnum Gjaldstovuna, skulu landsstovnar bert upplýsa kontustreingin og ikki kontunummar. Landsstovnar eru stovnar, sum eru á fíggjarløgtingslógini við rakstrarjáttan ella løgujáttan, landsfyritøkur og almennir grunnar, umframt teir stovnar, ið koma undir málsræði hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

**2. Løntakarin, ið fer í barsilsfarloyvi**
Skriva p-tal hjá løntakara, umframt navn, bústað o.a.

**3. Barsilstíðin**
Skriva fyrsta og síðsta barsilsdag. Um søkt verður til og við viku 48 ella 52 eftir barnsburð/ættleiðing, er nóg mikið at seta byrjanardagfesting og kross í kassan við vikutali. Fáa foreldur tvey børn ella fleiri, verða 4 vikur lagdar afturat (+ 4 vikur: Fleirburar). Verður barn/børn fødd áðrenn 32. viku, verða 8 vikur lagdar afturat (+ 8 vikur: Barnsburður áðrenn 32. viku).

Verður barsilstíðin býtt upp, skulu tíðarskeiðini skrivast á hvør sína reglu. Tíðarskeiðið kann ikki vera minni enn ein vika. Ein vika er 7 fylgjandi dagar.

Mammur hava rætt til barsilspening 4 vikur áðrenn mettan barnsburð ella upp til 8 vikur áðrenn mettan barnsburð, um mamman við "Váttan um sjúku hjá barnakonu ella vanda fyri fosturskaða" prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera til arbeiðis.

Eftir barnsburð hava foreldur lógartryggjaðan rætt til at vera heima hjá barninum í til samans 52 vikur. Tey hava rætt til barsilspening í 52 av hesum vikum. Harav eru fyrstu 14 vikurnar til mammuna, 4 vikur eru til pápan ella sammóðurina, og 34 eru til býtis.

Pápin ella sammóðirin kunnu nýta sínar 4 vikur samstundis, sum mamman nýtir sínar, og skal hava nýtt tær innan 52 vikur. Vikurnar, sum eru til býtis, kunnu einans nýtast av einum foreldri í senn. Tær kunnu í fyrsta lagi nýtast aftan á viku 14 eftir barnsburð, og tær skulu vera nýttar innan 52 vikur.

Einlig hava rætt til allar 52 vikurnar innan tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð.

Foreldur, ið fáa fleirburar, fáa 4 vikur aftur at samlaðu barsilstíðini.

Foreldur, ið fáa barn áðrenn 32. viku í viðgongutíðini, fáa 8 vikur aftur at samlaðu barsilstíðini.

Foreldur, ið ættleiða, hava rætt til barsilspening í til samans 52 vikur innan fyrstu 56 vikurnar eftir móttøku av barninum. Av teim 52 vikunum kunna foreldrini nýta upp til 4 vikur samstundis. Harafturat hava tey bæði rætt til barsilspening í upp til 4 vikur áðrenn móttøku av barninum. Treytin er, at tey eru uttanlands eftir barninum hetta tíðarskeið.

Í summum sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum hava løntakarar rætt til løn frá arbeiðsgevara ein part ella alla barsilstíðina. Um løntakarin hevur rætt til løn ein part av barsilstíðini, er til-dagurin síðsti lønardagurin. Tá verður eingin krossur settur í kassarnar við vikutølunum.

**4. Arbeiðsmarknaðarviðurskifti**
Rindar arbeiðsgevarin A-inntøku í barsilstíðini, skal mánaðarliga lønin upplýsast her.

Broytist lønin hjá løntakaranum í barsilstíðini, skal arbeiðsgevarin skriva dagfesting fyri broytingina og mánaðarligu lønina í teig 5.

Løntakarin kann røkja starv niðursetta tíð, t.d. ein part av barsilstíðini, um hann vil tað. Arbeiðir hann vanliga t.d. 40 tímar um vikuna, og hann í barsilstíðini framhaldandi arbeiðir 10 tímar, skriva tá, at løntakarin arbeiðir 25% av fullari tíð. Inntøkugrundarlagið verður lækkað samsvarandi hesum.

**5. Viðmerkingar**
Eru viðmerkingar, skulu tær skrivast her, t.d. um lønin hjá løntakaranum broytist í barsilstíðini. Sí punkt 4 í vegleiðingini.

**6. Váttan frá umsøkjara**
Her váttar arbeiðsgevarin, at givnu upplýsingarnar eru rættar, og at hann fer at boða frá broytingum, sum kunnu ávirka barsilsfarloyvið.

**7. Til løntakaran at fylla út**
Her skal løntakarin m.a. upplýsa, um hann hevur tilknýti til fleiri arbeiðsgevarar, er einligur, og um hann hevur rætt til barsilspening úr øðrum landi.

Løntakarin skal eisini vátta, at upplýsingarnar, ið arbeiðsgevarin hevur givið, eru rættar, og at løntakarin er um barnið í barsilstíðini.

**8. Váttan frá mammuni**
Her skal mamman vátta, um søkt verður um barsilspening vegna pápan ella sammóðurina at barninum. Hon skal eisini vátta, um pápin ella sammóðirin søkja um barsilspening fyri meira enn 4 vikur eftir 14. viku eftir barnsburð.

Umsóknin skal útfyllast nágreiniliga. Vanta upplýsingar ella neyðug skjalprógv, ger Barsilsskipanin vart við hetta. Tá skulu upplýsingarnar útvegast Barsilsskipanini innan 14 dagar, annars fellur umsóknin burtur.

Verða skeivar ella misvísandi upplýsingar givnar, verða goldnar upphæddir afturkravdar. Gev eisini gætur, at sambært § 162 í revsilógini kann eisini verða ásett sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir. Upplýsingar í umsóknini kunnu í sambandi við eftirlit verða eftirkannaðar við heimild í § 21 í barsilslógini.

Gjølligari kunning um barsilsfarloyvið er at finna á heimasíðuni hjá Barsilsskipanini, www.barsil.fo.

**Henda umsókn kann innihalda persónligar upplýsingar, gáa tí um trygdina**
Send umsóknina um álítandi postskipan til barsil@taks.fo ella lat okkum hana á annan tryggan hátt.

TAKS, Postboks 2151, 110 Tórshavn, tel. 35 26 00, barsil@taks.fo.